# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Aksel Zachariassen, Klaksvík**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánadagin, 68 ára gamal.

**Diny Heinesen, Toftir,** andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mánadagin, 89 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík hóskvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Diny, kunnu lata Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi eina peningagávu. Konta í peningastovnunum.

# Dagrøktin 35 ár

Mánadagin 2. november 2009 var 35 ára føðingardagshald í Dagrøktini hjá Tórshavnar kommunu, sum heldur til í Arnes Minde á Kirkjuvegi 1. Dagrøktarar, býráðslimir, starvsfólk hjá kommununi, foreldur og umboð frá pressuni vóru til staðar.

Leiðarin Joan Simonsen, sum eins og fyrsti leiðarin Annika Nielsen er úr Nólsoy, bjóðaði vælkomin, eitt barnakór sang og Heðin Mortensen, borgarstjóri, helt føðingardagsrøðu. Eftir røðuna góvu borgarstjórin og Ingibjørg Berg kommunustjóri øllum dagrøktarum eina bókagávu við persónligari heilsan. At enda segði Katrin Petersen, leiðari á barna- og ungdómsdeildini, frá um eina nýkomna samrøðubók til smæstu børnini. Allir dagrøktarar fingu hvør sína bók heim við.

*Kelda: www.torshavn.fo*



*Joan Simonsen, leiðari á Dagrøktini og Heðin Mortensen, borgarstjóri*



*F.v.: Ingrid Midjord og Brynhild Mohr Joensen, fyrrverandi leiðarar, Heðin Mortensen, borgarstjóri, Annika Nielsen, fyrsti leiðarin, og Joan Simonsen, leiðari á Dagrøktini*

# MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 7. nov. fyllur Óli Johansen, vanliga nevndur Suðringurin. Føðingardagurin verður hildin í heiminum Sjógøta 135, Tvøroyri. Opið hús frá kl. 13-20.

**60 ára føðingardagur**
23. okt. fylti Solmaj í Lágabø, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 7. nov. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 4. nov. verður Arna Dalbø Hansen, Svínáir, 80 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 7. nov. frá kl. 12 til kl. 15.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 6. nov. verður Hildigarð Hansen, Syðrugøtu, 90 ár. Dagurin verður hildin í Gøtubrá frá kl. 19. Øll eru vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen (Stina og Dia av Syðradali), gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 6. nov. kunnu hjúnini Maria og Hans David P. Johansen, Strendur, halda gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Sjókaféini í Runavík saman við familjuni.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 7. nov. hava Jonny og Thomas Jacobsen, Søldarfjørður, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 8. nov. kunnu hjúnini Herborg og Hildibjart Johansen, Tórshavn, halda gullbrúdleyp. Tey ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin til eina hugnaliga løtu í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøta 9 frá kl. 12 til 17.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

**Diamantbrúdleyp**
Mánadagin 9. nov. hava Amalie og Jens Mouritsen, Sørvágur, verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin 14. nov. frá kl. 18 hjá soninum, á Magnusarbø 6, Sørvágur.

## Dagurin

4. november. Otto. Ivingarsamt er, hvør hesin Otto er, men líkt er til, at sipað verður til biskupin Otto úr Bamberg, sum doyði í árinum 1139. Navnið er týskt og merkir ríkidømi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# PhotoCare letur upp í Hoyvík

Í morgun læt fotohandilin PhotoCare upp í nýggjum hølum í Hoyvík.

Fotohandilin PhotoCare er fluttur úr Dr. Jakobsensgøtu í Havn til Brekkutún 3 í Hoyvík. Niels Jacob Heinesen frá PhotoCare sigur, at tað er vegna plásstrot og nýggjar tænastur, at hann hevur valt at flyta í størri hølir. Í miðbýnum høvdu vit 32 fermetrar at ráða yvir, og í Hoyvík hava vit 200 fermetrar.

Í nýggju hølunum hava vit víðkað tænastuna, til at vit nú eisini hava eitt nútímans fotoatelier, eins og vit kunnu framleiða alt frá passmyndum til stórar plakatir. Eisini prenta vit á T-shirt, eins og klædnaprent sum heild. Vit koma at leggja dent á myndatøku, myndagávur og skeiðvirksemi. Hesi skeið vera fyri vanliga brúkaran, eins væl og tann meira roynda. Eisini vera skeið fyri tey, sum fyrstu ferð hava fingið sær eitt digitalt myndatól.

Í miðbýnum vóru vit grannar hjá FK í Dr. Jakobsensgøtu og nú eru grannar hjá FK í Hoyvík, sigur Niels Jacob Heinesen frá PhotoCare.

*mg*





